# Viðurgjaldsfrágreiðing fyri Betri P/F

## 2025

## Innihaldsyvirlit

Inngangur ..... 3
Fíggjarlig úrslit ..... 4
Alment um samsýning til nevnd og stjórn ..... 4
Samsýning til nevnd ..... 5
Samsýning til nevnd fyri roknskaparárið 2025 ..... 6
Samsýning til stjórn ..... 7
Samsýning til stjórn fyri roknskaparárið 2025 ..... 7
Samanburðaryvirlit ..... 8
Samanburðaryvirlit nevnd og stjórn ..... 8

# Inngangur

Henda viðurgjaldsfrágreiðing greiðir frá tí samsýning, sum hvør limur í nevnd og stjórn í Betri P/F, skrásetingarnummar 3690, hevur móttikið í roknskaparárinum 2025.

Viðurgjaldsfrágreiðingin inniheldur eisini samanlíkningar tøl fyri tíðarskeiðið 2022 til og við 2025.

Samsýningin til nevnd og stjórn fyri 2025 er latin í tráð við lønarpolitikkin hjá Betri P/F.

Lønarpolitikkurin hjá Betri P/F fevnir um kravið í §71 í bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed, líkasum viðurgjaldsfrágreiðingin samsvarar við ásetingina um upplýsingarkrøvini í §77d, stk 6.

Lønarpolitikkurin hjá Betri P/F varð seinast góðkendur á aðalfundinum hjá Betri P/F hin 11. apríl 2025.

Upplýsingarnar, sum eru tiknar við í hesa viðurgjaldsfrágreiðing, eru tiknar frá bókhaldinum hjá bankanum og frá grannskoðaðu ársfrásøgn bankans, sum er atkomilig á heimasíðu bankans.

## Fíggjarlig úrslit

Fyri nærri umrøðu av fíggjarligu úrslitum felagsins fyri roknskaparárini 2022-2025, verður víst til ársfrásøgnina hjá felagnum fyri tey viðkomandi árini.

## Alment um samsýning til nevnd og stjórn

Í tráð við lønarpolitikkin hjá felagnum, verða nevnd og stjórn í felagnum lønt við eini fastari løn.

Lønarpolitikkurin hevur yvirskipað til endamáls at seta leiðreglur fyri áseting av løn, sum aftur er í tráð við og fremur eina skinsama og virkna váðastýring, sum ikki skundar undir, at tiknar verða ovurhonds stórar váðar. Tað er harafturat endamálið við lønarpolitikkinum, at hesin er í tráð við, og styðjar uppundir virkisætlanina hjá felagnum, stevnumið, virðir og langtíðar áhugamál, herundir eina haldgóða virkisætlan. Somuleiðis er lønin ikki tengd at styttri tíðarmálum og rakstrarúrslitum.

Á henda hátt viðvirkar lønarpolitikkurin eisini til burðardygd.

Lønarpolitikkurin skal vera kynsneutralur soleiðis, at felagið, uttan mun til kyn, skal tryggja líka løn fyri líka arbeiði ella arbeiði av sama virði.

At enda skal lønarpolitikkurin vera í tráð við lógarásetingar um verju av kundum og íleggjarum og lóggávu annars.

# Samsýning til nevnd

Nevndarlimirnir hjá Betri P/F fáa eitt fast gjald, sum aðalfundurin hjá felagnum góðkennir.

Strembað verður eftir, at nevndarsamsýningin skal vera í tráð við marknaðarsiðvenju fyri samanberandi felægum, og í tráð við kravdu førleikar, avrik og vav av arbeiðinum hjá nevndarlimunum.

Formaðurin og næstformaðurin móttaka hvørt ár ein margfald, á ávikavist tvær og hálvaaðru ferðir samsýningina fyri víðkaðu uppgávurnar, sum hesir fremja.

Nevndarlimir, sum luttaka í nevndum hjá dótturfeløgum fáa serskilda samsýning fyri hetta.

Betri P/F hevur eisini eina tilráðingarnevnd og er hendan mannað av umboðsráðslimun.

Aðalfundurin hjá felagnum hevur góðkent niðanfyrinevndu samsýningar fyri roknskaparárið 2025.

| **Føst árlig samsýning í Tdkr.** | **2025** |
|---|---:|
| **Nevnd** | |
| Formaður | 360 |
| Næstformaður | 270 |
| Nevndarlimur | 180 |
| **Tilráðingarbólkur** | |
| Formaður | 32 |
| Limur | 21 |

Viðvíkjandi samsýningini til umboðaráðslimir, er hendan góðkend av umboðaráðnum og eru samsýningarnar sum víst er í talvuni niðanfyri.

| **Føst árlig samsýning í Tdkr. til umboðaráð** | **2025** |
|---|---:|
| **Umboðsráð** | |
| Formaður | 108 |
| Næstformaður | 68 |
| Umboðsráðslimur | 54 |

## *Samsýning til nevnd fyri roknskaparárið 2025*

Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir nevndarsamsýning til nevndarlimirnar í Betri P/F, men talvan vísir eisini samsýningina sum nevndarlimirnir fáa frá øðrum feløgum í samtakinum, og soleiðis er talvan eitt yvirlit yvir samlaðu samsýningina nevndarlimirnir fáa.

| Samsýning Tdkr (2025) | Nevndar-samsýning | Umboðaráð | Betri Banki | Betri Trygging | Betri Pensjón | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Navn og starv 1) 2)** | | | | | | |
| Jens Johan Dam, nevndarformaður | 360 | 54 | 235 | 0 | 0 | 649 |
| Poula Michelsen, næstforkvinna | 270 | 0 | 0 | 142 | 0 | 412 |
| Jákup Egholm Hansen | 180 | 54 | 0 | 0 | 57 | 291 |
| Mortan Simonsen | 180 | 54 | 0 | 0 | 0 | 234 |
| Tóra við Keldu | 180 | 0 | 0 | 0 | 0 | 180 |
| Hallur Thomsen | 130 | 69 | 0 | 0 | 0 | 199 |
| Sverri justinussen | 180 | 0 | 0 | 0 | 0 | 180 |
| Tomma Sunnva Petersen | 180 | 0 | 0 | 0 | 0 | 180 |
| Sonni L. Petersen | 180 | 0 | 0 | 0 | 0 | 180 |
| Petur Elias Nielsen | 51 | 0 | 0 | 0 | 20 | 71 |
| | | | | | | |
| Útreiðsluendurgjald til nevndarlimir er ikki tikið við í yvirlitið. | | | | | | |

1) Nevndarlimir hava ikki rætt til samsýning, eftir at teir eru farnir frá.

2) Nevndin er ikki fevnd av nakrari bonusskipan, sum er sett í verk av felagnum.

# Samsýning til stjórn

Viðurgjaldsavtala og setanartreytir annars fyri stjórn verður ásett millum nevndina og tann einstaka stjórnarlimin til endaliga góðkenning av nevndini í felagnum. Viðurgjaldsavtalur kunnu gerast fyri fleiri ár.

Samsýningin og samansetingin til stjórnina er ásett við tí fyri eyga, at tiltrekkja og halda fast við vælskikkaða stjórn.

Viðurgjaldið til stjórn er ein føst samsýning og er samansett av hesum staklutum:

a) Føst grundløn
b) Fast pensjónsgjald
c) Vanligar starvsfólkaágóðar, sum ikki eru í peningi.

Umframt hetta kann rindast fráfaringarsamsýning.

Í tann mun stjórin luttekur í nevndum hjá dótturfeløgum, er samsýning fyri hetta arbeiði, íroknað fasta viðurgjaldið til sjtórn.

## *Samsýning til stjórn fyri roknskaparárið 2025*

| Samsýning Tdkr (2025) | Føst samsýning | Pensjón | Onnur samsýning 1) | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| **Stjórn 1) 2) 3)** | | | | |
| Evy L. Jacobsen, forstjóri | 2.024 | 269 | 94 | **2.387** |
| Útreiðsluendurgjald til stjórn er ikki tikið við í yvirlitið. | | | | |

1) Stjórin hevur frían bil

2) Forstjórin kann av Betri P/F uppsigast við 12 mánaðar freist og kann sjálv siga upp við 6 mánaðar freist.

3) Stjórin er ikki fevnd av nakrari bonusskipan, sum er sett í verk av felagnum.

# Samanburðaryvirlit

## *Samanburðaryvirlit nevnd og stjórn*

| Samsýning í Tdkr | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|
| **Nevnd 1) 2)** | | | | |
| Jens Johan Dam, Nevndarformaður | 649 | 464 | 73 | 19 |
| Poula Michelsen, Næstforkvinna | 412 | 402 | 338 | 131 |
| Jákup Egholm Hansen | 291 | 184 | 54 | 54 |
| Mortan Simonsen | 234 | 234 | 234 | 234 |
| Tóra við Keldu | 180 | 221 | 182 | 54 |
| Hallur Thomsen | 199 | 108 | 108 | 108 |
| Sverri justinussen | 180 | 180 | 180 | 180 |
| Tomma Sunnva Petersen | 180 | 130 | 0 | 0 |
| Sonni L. Petersen | 180 | 180 | 180 | 180 |
| Petur Elias Nielsen | 71 | 252 | 252 | 248 |
| Aslaug Gisladóttir 9) | 0 | 162 | 570 | 570 |
| Tummas Pauli Djurholm | 0 | 51 | 180 | 180 |
| Ragnar Joensen | 0 | 51 | 180 | 180 |
| Gunn Danielsen | 0 | 0 | 78 | 270 |
| Lars Løkke Rasmussen | 0 | 0 | 0 | 49 |
| | | | | |
| **Stjórn 3) 4) 5)** | | | | |
| Evy L. Jacobsen, forstjóri | 2.387 | 2.220 | 2.194 | 2.129 |
| | | | | |
| Útreiðsluendurgjald til nevndar- og stjórnarlimir er ikki tikið við í yvirlitið. | | | | |

1) Nevndarlimir hava ikki rætt til samsýning, eftir at teir eru farnir frá.
2) Nevndin er ikki fevnd av nakrari bonusskipan, sum er sett í verk av felagnum.
3) Stjórin hevur frían bil
4) Forstjórin kann av Betri P/F uppsigast við 12 mánaðar freist og kann sjálv siga upp við 6 mánaðar freist.
5) Stjórin er ikki fevnd av nakrari bonusskipan, sum er sett í verk av felagnum.